Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um tilskot til heilivág, settur landsstýrismanninum við heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera tilskotsstigan til heilivág stigvaksandi eftir inntøku?

Viðmerkingar
Í Føroyum hava vit eina góða heilsutrygdarskipan. Men spurningurin er, um vit ikki kunnu gera broytingar í tilskotsstiganum, so hann sosialt vendir rættari.

Í dag er tað soleiðis, at persónar yvir 67 ár og fyritíðarpensjonistar hava rætt til 100 % tilskot fyri allan heilivág, tá árligu eginútreiðslurnar til heilivág eru farnar upp um kr. 1.359,15. Tað merkir, at hesi ongantíð gjalda meira enn kr. 1.359,15 í einum ári fyri tilskotsheilivág. Fólk millum 18 og 67 ár skulu harafturímóti hava eginútreiðslur fyri kr. 2.125,65 fyri tilskotsheilivág, áðrenn tey koma upp á 100 %. Børn og ung yngri enn 18 ár gjalda einki egingjald. Upphæddirnar eru ásettar í grein 18 í Heilsutrygdarlógini.

Ein lesandi yvir 18 ár á miðnámi ella hægri lesnaði fær millum kr. 1.900 og 4.400 um mánaðin alt eftir, um viðkomandi hevur egnan bústað og/ella børn. Hevur viðkomandi tørv á dýrum heilivági, er hetta ein stórur postur á fíggjarætlanini, og tað kann vera ringt at fáa endarnar at røkka saman. Hetta meðan ein arbeiðsvirkin persónur, sum er yvir 67 ár og til dømis forvinnur kr. 40.000 um mánaðin, sleppur munandi bíligari.

Um tilskotið varð latið stigvaksandi eftir inntøkuni hjá fólki, uttan mun til aldur, so høvdu láglønt, lesandi og fyritíðarpensjonistar av sær sjálvum fingið størsta tilskotið, meðan hálønt høvdu rindað mest. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 17. mars 2021

Ingilín Didriksen Strøm